**Tíðindabræv 23/2014 – Rakstur**

SJÓVINNUSTÝRIÐ
FAROESE MARITIME AUTHORITY

Sept. 2014

## MARPOL: Broytingar í skjølunum A og B í uppískoytinum til IOPP-sertifikatið

Í uppískoytinum til IOPP-sertifikatið hevur orkan av brenniovninum higartil verið tikin við. Men seinastu tillagingar av nevnda sertifikatið hava havt við sær ymiskar roknihættir, so sum í kW, Kcal um tíman og kg um tíman. Hetta hevur verið atvoldin til ørkymlan hjá bæði skipamanningum, myndugleikum, klassafeløgum og havnamyndugleikum (PSC).

Av hesi orsøk hevur MEPC-fundur í IMO samtykt broyting í einsháttaðu tulking av reglu 12.1 í Annex 1 undir MARPOL (sí MEPC 58/63, ískoyti 28), sum fyriskrivar, at brennimegin í brenniovninum verður strikað úr skjølunum A og B í uppískoytinum til IOPP-sertifikatið.

Broytingin verður sett í gildi við hjálagda MEPC 235(65) frá 1. oktober 2014.

Væntandi fer nýggja útgávan av skjølunum at byrgja fyri teim trupulleikum, ein í seinastuni hevur sæð í sambandi við kanningar av skipum í fremmandari havn (PSC).

Encl.: MEPC.235(65)

--- 00 ---